gult36 cyan36 magenta36 svart36



## HEILSANIR



**Góði fitti Rani**
Hjartaliga tillukku við 6 ára degnum. Alt tað besta í framtíðini. Vit elska teg so nógv. Jesus pápi veri hjá tær.
**Heilsan mamma, Rúni og Rókur**



**Allarbesta Avva/fastir**
Tillukku við 17 ára degnum. Muss og klemm.
**Mona, Sigrið og Ari**



**Góði abbi**
Hjartaliga tillukku við 70 ára degnum, takk fyri ein góðan føðingardag. Eisini ein heilsan til ommu.
**Abbabørnini**



Vit vilja takka øllum, sum mintust okkum á okkara hjúnabandsdegi við blómum, fjarritum og gávum. Og ikki minst takka øllum tykkum, sum hjálptu okkum at smíða og á annan hátt. Eisini ein stór tøkk til brúfólkini og tey vøkru orð frá presti, sum gjørdu vígsluna ógloymandi. Og ta hugnaligu løtu í HB-húsinum.
**Vinarligast Heri, Nena, Jenny S. og A. Tórunn**



**Góða omma!**
Hjartaliga tillukku við 80 ára føðingardegnumí dag.
**Ynskja Annika, Paula og Jens**



**Góða lítla Karin**
Vit ynskja tær tillukku við 4 ára føðingardegnum. Guds signing.
**Omma og abbi**



**Góða Anvør**
Vit ynskja tær so hjartaliga tillukku.
**Heilsan vit øll í húsinum**



**Góða Mathilda**
Hjartaliga tillukku við føðingardegnum og øll góð ynskir fyri framtíðina.
**Ynskja mamma og pápi**



**Kæri maður og pápi**
Hjartaliga tillukku við teimum 60 árunum. Takk fyri alt
**Kona og børn**



**Góða elskaða Elin Maria**
Hjartaliga tillukku á 3 ára degnum sum var 17.4., og alt tað besta ynskja vit tær.
**Mamma, babba, Borgar og Bárður**



Góði elskaði Rasmus
Hjartaliga tillukku við 4 ára føðingardegnum 22. apríl.
Ynskja mamma og Ingi



**Góða dóttir**
Hjartaliga tillukku við teimum 34 árunum.
**Mamma og babba**



Kjólin manglar. Hahaha. Tillukku við føðingardegnum
**Heilsan XX**



**Barbara og Jóan Petur**
Hesi bæði fittu børnini eru konfirmantar 2001. Tykkum verður ynskt tillukku við konfirmatiónsdegnum. Barbara 8. apríl, Jóan Petur 22. apríl.
**Heilsan vit í Hoyvík og á Eiði**



**Góða omman**
Hjartaliga tillukku við 80 ára degnum. Takk fyri alt.
**Heilsan Signar og Henning**

### Heilsanir

30,- kr. Sosialurin

**5 ferðir um vikuna**

**Gevið gætur**

Bert heilsanir, skrivaðar á henda lepan og goldnar frammanundan við 30,- kr. fáa innivist í blaðnum. Til ber eisini at lata okkum lepan og gjald í avgreiðsluni á Argjavegi 26, millum kl. 8.00 og 16.00.

**Myndaheilsanir skulu vera okkum í hendi á miðdegi 2 dagar fyri útkomudag.** Viðmerkið annars niðanfyri, um heilsanin ynskist í blaðið ávísan dag.
❑ Týsd. ❑ Mikud. ❑ Hósd. ❑ Fríggjad. ❑Leygard.

Tekstur:..............................................................................
..............................................................................
..............................................................................
..............................................................................
..............................................................................
..............................................................................

**Myndina aftur:** Minnist til at skriva navn og bústað aftanfyri á myndina og at leggja við ein frankeraðan brævbjálva við navni og bústaði.
Um neyðugt fyri arbeiðsgongdina, taka vit okkum rætt til at fáa heilsanina í blaðið annan dag, enn tann ynskta.

Sent hevur (skal fyllast út).
Navn: ..............................................................................
Bústaður: ..............................................................................
Bygd/býur: ....................................... Tlf.: .................

Sendið lepan, mynd og gjald til:
Sosialurin
Postsmoga 76 •110 Tórshavn
Merkið bjálvan: **»Heilsanir«**

gult37 cyan37 magenta37 svart37



## TILTØK

### FØÐINGAR

5. apríl fingu Beata Johansen og Eyðstein Sømark, Skálavík, ein son. Hann var 54 cm. langur og vigaði 3910 gr.

7. apríl fingu Elin Horn, Sandur og Peter George Tilley, England, eina dóttur. Hon var 54 cm. long og vigaði 4100 gr.

8. apríl fingu Reidunn Andreasen, Tjørnuvík og Ingi Zachariasen, Streymnes, ein son. Hann var 54 cm. langur og vigaði 3300 gr.

11. apríl fingu Emy Fjallstein og Gunnar Gardar, Signabøur, eina dóttur. Hon var 51 cm. long og vigaði 2600 gr.

11. apríl fingu Evy og Mikkjal Danielsen, Miðvágur, eina dóttur. Hon var 51 cm. long og vigaði 3500 gr.

12. april fingu Durita Isaksen, Kvívík og Magnus E. Poulsen, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 54 cm. long og vigaði 3350 gr.

12. apríl fingu Annbritt og Finn Johannesen, Kollafjørður, ein son. Hann var 56 cm. langur og vigaði 4100 gr.

13. apríl fingu Óluva og Jentoft Sunnsker, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 55 cm. long og vigaði 3850 gr.

14. apríl fingu Jónmei og Jákup Andrias Jacobsen, Leirvík, ein son. Hann var 53 cm. langur og vigaði 3400 gr.

14. apríl fingu Durita Sigurðsdóttir Rasmussen, Søldarfjørður og Heini Eliasson Egholm, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 47 cm. long og vigaði 2190 gr.

15. apríl fingu Súsanna Guðrið Dam og Ólafur Debes Arnfriðsson, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 53 cm. long og vigaði 3750 gr.

15. apríl fingu Jenny og John Kruse, Sørvágur, eina dóttur. Hon var 48 cm. long og vigaði 2600 gr.

16. apríl fingu Majken Johannesen og Jógvan á Toftini, Toftir, eina dóttur. Hon var 51 cm. long og vigaði 3000 gr.

16. apríl fingu Katrin og Djóni Nolsøe Joensen, Hoyvík, eina dóttur. Hon var 59 cm. long og vigaði 4300 gr.

16. apríl fingu Helen Hansen og Egil Weihe, Runavík, ein son. Hann var 52 cm. langur og vigaði 3200 gr.

19. apríl fingu Heidi og Rúni Winther, Sandur. ein son. Hann var 56 cm. langur og vigaði 4500 gr.



14. apríl fingu Harriet Petersen og Rói Kalsø Sjúrðarson ein son. Hann var 55 cm. langur og vigaði 4150 gr.

### ANDLÁT

**14. apríl:**
Albin Vang, Miðvágur, 81 ár.
Hans Dávid Matras, 77 ár.

**15. apríl:**
Jákup Pauli Thomsen, vanliga nevndur Jákup Pauli á Brekkuni, Hvalba, 81 ár.

**16. apríl:**
Fredrik Hansen, ættaður úr Froðba, búsitandi í Esbjerg, 71 ár.

**17. apríl:**
Maria Suffía Joensen, vanliga nevnd Mia, Skopun, 91 ár.

### Gudstænastur

***1. sunnudag eftir páskir***
*Havnar kirkja:* talvan gongur fyri Bláakross í Føroyum, Bjarni Bæk
*Vesturkirkjan:* kl. 11, Heri Joensen
*Tjørnuvík:* kl. 12, Marjun Bæk
*Kollafjørður:* kl. 11, M. R. Jacobsen
*Hósvík:* kl. 11, Inga P. Dam. Í øllum kirkjum í Norðstreymoyar prestagjaldi gongur talvan fyri nýggju bíbliuútgávuna
*Gjógv:* kl. 11, konfirmatión Emil Olsen. Talvan gongur fyri kirkjuna
*Bøur:* kl. 12, David Johannesen
*Gøtu:* kl. 11, konfirmatión Kjartan Mørkøre. Í Gøtu verður gudstænastutíðin fyri summarið broytt til kl. 11
*Viðareiði:* kl. 11 konfirmatión, Elsa Funding. Broytt kirkjutíð: 22. apr. og frameftir verður farið í kirkju á Viðareiði kl. 11
*Sandavágs kirkja:* kl. 15 Sanggudstænasta
*Tvøroyri:* P. M. Rasmussen, (útvarpað)
*Sumba:* kl. 12, altarg., Erland Beder
*Sandur:* kl. 12 konfirmatión, altarg., Jákup R. Hansen

### Hebron, Argir

Sunnudagin kl. 10.30 breyðbróting, kl. 12 sangkórið luttekur á møtinum kl. 18.

### Meinigheitin í Hoyvík

Sunnudagin kl. 14 í Hoyvíkar skúla, sunnudagsskúli. Einki møti sunnukvøldið vegna møti hjá Theresiu Wairimu í Ítróttarhøllini í Runavík.

### Kirkju- og missiónshúsið á Argjum

Sunnudagin kl. 11 gudstænasta, kl. 14 sunnudagsskúli og junior, kl. 18 møti við Signar og Sólgerð á Reynatrøð.
Mánakvøldið kl. 20 ungdómsmøti við Ejvind Mouritsen.
Týskvøldið kl. 20 venur Argjakórið – nýggir limir eru vælkomnir.
Mikumorgunin kl. 07 bønarløta.
Hóskvøldið kl. 20 Bíbliutími við Regin Olsen, Bøn – Jákup 1. Mós 32, 22-32
Heimasíða okkara: www.koma.fo

### Frelsunarherurin, Tórshavn

Sunnudagin kl. 11 møti, kl. 13.30 sunnudagsskúli, kl. 17.30 bøn, kl. 18 møti, major Inger Sofie Tjåland. Mánadagin kl. 17 skótar.

### Samkoman Immanuel

Sunnudagin kl. 13 sunnudagsskúli, kl. 17 møti.


*Innbjóðing til kunningarfund um EINKARRÆTT:*

**Patent**
**Vørumerki**
**Brúksmodell**
**Design**

Patent- og Varemærkestyrelsen skipar saman við TK Stovuni og European Patent Office fyri kunningarfundi

**á Hotel Føroyum**
**Hóskvøldið 26. apríl 2001, kl. 19.00-22.00**
**og**
**á Miðnámsskúlanum í Vági**
**Leygardagin 28. apríl kl. 14.00-16.00**

Fundurin er fyri vinnurekandi og einstaklingar, sum hava serligan áhuga fyri evninum. Fundartíðin er íroknað kaffisteðg.
Henrik Hugger, kunningarstjóri hjá Patent- og Varemærkestyrelsen, og Erik Axen, vinnuframaráðgevi frá PVS, greiða frá, hvussu farið verður fram, tá ein skal taka patent, og hvørja hjálp ein kann fáa í hesum sambandi. Teir viðgera ofta settar spurningar, og somuleiðis vísa teir á, at hesi viðurskifti viðkoma bæði stórum og smáum virkjum.
Hóast fólk ella virkir fáa eitt gott hugskot, merkir tað ikki altíð, at ein skal taka eitt patent. Greitt verður frá ymiskum øðrum møguleikum.
Somuleiðis verður greitt frá, hvussu ein tryggjar sær rættin til eitt vørumerki, eitt brúksmodell og eitt design (klæðir, lampur, ymiskt úr skinni v.m.). Hvat er munurin millum patent og brúksmodell, og nær er tað av týdningi at verja eitt design?

**Tilmelding:**
TK Stovan, **fax** 31 93 63, **tlf.** 31 73 66 ella **teldupost** tk@tk.fo - Tilmelding í seinasta lagi **24. apríl 2001.**
Tiltakið er ókeypis, men neyðugt er at melda seg til frammanundan.

Vinarliga

TK STOVAN

